UTTAN ÚR HEIMI

# Týskarar mugu bíða eftir úrslitinum



*Gerhard Schröder og Angela Merkel taptu valið sunnudagin. Ein møguleiki er, at tey semjast um at skipa stjórn saman*

**Bæði Gerhard Schröder og Angela Merkel taptu valið sunnudagin**

TÝSKLAND
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Týskarar sótu sum á nálum sunnukvøldið og gjáranáttina. Líka síðani Gerhard Schröder, kanslari, skrivaði út val, høvdu veljarakanningarnar givið andstøðuni og Angelu Merkel sigurin, men longu tann fyrsta forsøgnin vísti, at so var ikki.

Andstøðuflokkarnir fingu als ikki ta framgongd, sum roknað varð við. Tvørturímóti hevði tann borgarliga samgongan hjá CDU og CSU afturgongd. Á seinasta vali fekk hon 38,5 prosent, men hesaferð bara 35,2 prosent og 225 umboð í ríkisdagin. Tann lítli borgarligi flokkurin, Fríu Demokratarnir, hevði kortini framgongd og fekk 9,8 prosent av atkvøðunum og 61 tingmenn, men tað var kortini als ikki nóg mikið til at útvega andstøðuni meiriluta í ríkisdegnum.

Sosialdemokratarnir taptu eisini valið. SPD fekk á seinasta vali 38,5 prosent, men sunnudagin bara 34,3 prosent og 222 umboð, og harvið misti Schröder meirilutan, sum hann hevur havt saman við Teimum Grønu, sum høvdu eina lítla afturgongd og fingu 8,1 prosent og 51 tinglimir.

Vinstraflokkurin Die Linke, sum hevur fyrrverandi SPD-formannin Oscar Lafontaine sum ein av sínum oddamonnum, hevði tað besta valið og fekk 8,7 prosent og 54 tinglimir.

### Fáir møguleikar

Við 225 tinglimum aftan fyri seg er tað Angela Merkel, sum skal royna at skipa stjórn, men tað kann gerast ein tungur burður.

Tann fyrsti møguleikin, sum hon hevur, er at venda sær til Gerhard Schröder og sosialdemokratarnar fyri at vita, um tað ber til at skipa eina stórsamgongu av CDU/CSU og SPD, men sunnukvøldið tóktist sitandi kanslarin ikki serliga hugaður fyri hesum hugskotinum.

Hennara næsti møguleiki er at royna at fáa Tey Grønu at skipa stjórn saman við verandi andstøðu. Formaðurin hjá Teimum Grønu, Joschka Fischer, segði sunnukvøldið, at hann er sjálvandi sinnaður at tosa við Angelu Merkel, sendir hon boð eftir sær, men at samgongumøguleikarnir teirra millum eru smáir.

Miseydnast hesar báðar royndirnar hjá Angelu Merkel, kemur Gerhard Schröder aftur fram á pallin. Hann hevur tvinnar møguleikar. Hann kann royna at skipa stjórn saman við Fríu Demokratunum, men formaðurin í FDP, Guido Westerwelle, segði sunnukvøldið, at Fríu Demokratarnir halda seg til Merkel. Hin møguleikin hjá Schröder er at gera eina vinstrasamgongu saman við Teimum Grønu og Die Linke, men tað fer í hvussu er at krevja, at alt agg verður lagt til viks.

### Ein vanlukka

Týsku bløðini vóru í gjár á einum máli um, at valið sunnudagin var ein vanlukka fyri Angelu Merkel. Bløðini vístu á, at hon fekk færri atkvøður enn undanmaðurin Edmund Stoiber, sum tapti ímóti Schröder fyri trimum árum síðani.

– Merkel hevur bæði vunnið og tapt, og úrslitið var eitt stórt bakkast í royndum hennara at gerast kanslari, skrivaði blaðið Bild.

– Hennara framtíð er ótrygg, og ta næstu vikuna fer onkur at umhugsa, hvør skal loysa hana av sum kanslaraevni. Hon noyðist at stríðast fyri at røkka tí, sum hon hevði væntað at vinna, skrivaði Die Welt.

Angela Merkel er ættað úr gamla Eysturtýsklandi, og blaðið Leipiger Volkszeitung heldur, at tað vóru hennara fyrrverandi landsmenn, sum revsaðu hana.

## Friðarligt val

Fyri fyrstu ferð í 36 ár vóru afghanar á vali sunnudagin, og hóast Taliban hevði hótt fólk við báli og brandi, fóru tey á val, var valið friðarligt.

Sambært einum talsmanni hjá innanríkisráðnum í Kabul royndu uppreistrarmenn at órógva valið summastaðni har suðuri og har eysturi í landinum, men samanbrestir vóru kortini ikki. Myndugleikarnir stúrdu fyri ófriði og yvirgangsatsóknum, men tá valhølini lótu aftur seinnapartin sunnudagin, hevði einki valstað boðað frá ófriði.

– Valið er ein sigur fyri tað afghanska fólkið og ein ósigur fyri Taliban, segði talsmaðurin hjá innanríkisráðnum við Reuters.

Umleið 12,5 milliónir afghanar høvdu skrásett seg sum veljarar, og tey skuldu velja umboð í tey 34 landspartatingini umframt 249 umboð í undirhúsið í Kabul. Tað er ikki greitt, nær úrslitið av valinum kemur.

## 6 milliardir horvnar

Ein milliard dollarar ella einar seks milliardir krónur eru horvnar úr kassanum hjá irakska verjumálaráðnum, og sambært landsins fíggjarmálaráðharra er helst talan um ein tann størsta stuldurin í søguni.

Ali Allawi, fíggjarmálaráðharri, segði við bretska blaðið The Independent í gjár, at pengarnir eru farnir úr Irak, og at tað tykist vónleyst at finna teir aftur. Nógv bendir tó á, at pengarnir eru endaðir í Pakistan og Pólandi. Irak hevur keypt nógv vápn úr hesum báðum londunum, men í hesum førinum hevur landið fingið avgomul og ónýtilig vápn, og tí er talan um bæði svik og stuldur, sigur fíggjarmálaráðharrin. Sambært The Independent hava tey ónýtiligu vápnini kostað nógvum irakskum hermonnum og løgreglumonnum lívið, tí tey virkaðu ikki, tá tey skuldu brúkast.

Tað er ikki óhugsandi, at vesturlendskir millummenn hava verið uppi í handlinum, og í Bagdad halda embætismenn, at teir veruligu millummenninir eru at finna í teimum amerikonsku trygdartænastunum í Irak, skrivar The Independent.

Tað er heldur ikki bara irakska verjumálaráðið, sum hevur mist pengar. Sambært fíggjarmálaráðharranum hava elorku-, flutnings- og innanríkisráðið eisini mist fleiri milliardir krónur. Sambært ráðharranum kann tað vera orsøkin til, at elveitingin í Irak hevur virkað stak illa, síðani stýrið hjá Saddam Hussein varð koyrt frá.

## Ikki fleiri konur

Andaligu leiðararnir í Zimbabwe skjóta nú upp, at menn skulu ikki hava loyvi at hava meiri enn eina konu.

Tað er gamal siður í Zimbabwe, at menn hava fleiri konur, men teir kristnu leiðararnir í landinum halda, at tíðin er komin til at sleppa hesum gamla siðinum, skrivar AP. Hugskotið hevur fingið góða undirtøku frá politikarunum. Teir vísa á, at umleið ein fjórðing-ur av fólkinum í Zimbabwe eru smittað við eyðkvæmi, og at hugskotið hjá kirkjuleiðarunum kann vera eitt gott amboð í stríðnum ímóti sjúkuni.

Teir kristnu leiðararnir hava eisini skotið upp at broyta lógina, so tað verður bannað monnum at gifta seg við heilt ungum gentum. Teir mæla eisini politikarunum til at broyta ta lógargreinina, sum heimilar monnum at arva einkjurnar hjá brøðrum sínum.

## Nakin politikari

Nýsælendski politikarin Keith Locke man iðra seg um, at hann tók munnin dekan ov fullan ein dagin undan tjóðartingsvalinum, sum var sunnudagin.

Í síðstu viku segði Keit Locke, sum er tingmaður hjá Teimum Grønu, at hann var til reiðar at renna nakin ígjøgnum gøturnar í býarpartinum Epsom, um tann konservativi Rodney Hilde bleiv valdur inn á ting. Tá atkvøðurnar vóru taldar sunnukvøldið, vísti tað seg, at Rodney Hilde var valdur í tingið, so nú noyðist Keith Locke at halda orð.

– Eg havi ikki gjørt av, nær tað verður, og hvussu eg fari at gera, men eg vænti, at tilburðurin fær ein listarligan dám av einum ella øðrum slagi, segði Keith Locke við nýsælendsku fjølmiðlarnar í gjár. Fleiri í Epsom hava boðað frá, at tey ætla sær at geva Locke eitt ella annað, sum kann fjala ein ávísan part av kroppi hansara, tá hann fer út at renna.